# Nýggja Landssjúkrahúsið kann skjótt verða ov gamalt



**– Tað ógvuliga óheppið, at vit ikki fáa tikið nýggja bygningin hjá Landssjúkrahúsinum í brúk beinanvegin, tí framburðurin gongur so skjótt, at í summum førum ganga bara eini fimm ár, so mugu broytingar gerast. Tað merkir, at gongur ov long tí, kann tað henda, at vit vera noydd at flyta inn í ein bygning, sum ikki er tíðarhóskandi og tað er óheppið, sigur Hans Petur Nielsen, yvirlækni**

HEILSUVERKIÐ
*Áki Bertholdsen*

– Tað er ógvuliga umráðandi at vit fáa tikið nýggja bygningin hjá Landssjúkrahúsinum í nýtslu sum skjótast.

Tað heldur Hans Petur Nielsen yvirlækni á Landssjúkrahúsinum og limur í bygginevndini fyri nýggja bygningin.

Hann sigur, at verður peningurin ikki játtaður sum skjótast, so at útgerð kann keypast til nýggja bygningin, fer tað at fáa avleiðingar fyri effektivitetin hjá Landssjúkrahúsinum og tað fer eisini at fáa avleiðingar fyri tað nútíðarliga í byggingini.

Nýggi bygningurin hjá Landssjúkrahúsinum verður liðugur á Ólavsøku, men hann kemur at standa tómur og óbrúktur í óásetta tíð av tí, at ongin peningur er settur av næsta ár, til at keypa útgerð fyri.

Og enn er ongin vissa fyri, nær peningurin verður játtaður til útgerð, ella nær, tað fer at bera til at keypa hana.

Og hetta kemur illa við hjá Landssjúkrahúsinum.

Eftir ætlan skuldu nýggi bygningurin vera liðugur næsta ár, og tað verður hannn eisini.

## Mælir staðiliga frá at drála

Í eini frágreiðing , sum varð gjørd á sinni, skrivar bygginevndin, at “Bygginevndin mælir staðiliga frá at leingja byggitíðina út yvir 2003, tá hetta helst kemur at fáa álvarsligar fylgir fyri samlaða byggikostnaðin, aktualitetin í innrættingini og funktiónsloysnunum”.

Vit hava spurt hans Petur Nielsen, sum hevur verið limur í bygginevndini alla tíðina, hvat hetta merkir.

Hann sigur, at tað kemur ikki óvart á nakran, at brúk verða fyri 44 milliónum til útgerð til tann nýggja bygningin, tí tað hevur verið greitt frá fyrsta degi og tað hevur bygginevndin gjørt greitt alla tíðina í frágreiðingum og viðmælum.

– Hetta er ein upphædd, sum eigur at verða játtað afturat upphæddini til byggingina- sum politikararnir hava boðað frá, kemur at liggja um 35 milliónir.

Hann sigur, at framburðurin innan sjúkrahúsviðgerð gongurómetaliga skjótt og tí verður arbeitt við ógvuliga stuttari freist innan hetta øki.

– Hyggja vit eftir nýggjum sjúkrahúsum aðrastaðni, ganga ikki meiri enn fimm til átta ár, so verður farið undir at keypa nýggja útgerð, ella at broyta innrættingina, fyri at fylgja við tíðini.

– Á summum øðrum ganga ikki meiri enn eini fimm ár, so er nýggj og betri útgerð tøk, sum er betri enn tann gamla.

Hans Petur Nielsen sigur, at avleiðingarnar av at drýggja tað ov leingi at taka nýggja bygningin í nýtslu, kann tað enda við, at vit vera noydd at seta útgerð, sum er við at blíva ov gomul inn í høli, sum ikki eru ótíðarhóskandi og tað vildi verið óheppið.

Verður tað tí forhálað ov leingi, kann tað henda, at vit vera noydd at byggja um, longu áðrenn vit flyta inn fyri at fylgja við tíðini.

## Gongur útyvir effektivitetin

Hann sigur eisini, at tað er ein stórur bági fyri tilrættisleggingini av arbeiðnum á Lanndssjúkrahúsinum, at nýggi bygningurin ikki verður tikin í nýtslu.

– Tað er ein stórur trupulleiki, at vit fáa ikki lagt arbeiðið nóg væl til rættis, so at tað verður so effektivt sum gjørligt. Vit skulu ikki samanbera eitt sjúkrahús og eitt flakavirki. Men vit skulu ikki bara hjálpa sjúklingum, vit skulu eisini gera tað efffektivt. Og høvdu vit havt betri umstøður, kundi Lanndssjúkrahúsið verið væl effektivari enn tað er í dag.

Yvirlæknin sigur, at í sambandi við gamla og nýggja bygningin er tað ikki bara ein trupulleiki, at onki er sett av til útgerð.

– Vit skulu eisini hava játtan til at broyta gamla bygningin so at hann kann verða samanbundin við tann nýggja bygningin, tí tað er neyðugt fyri at taka nýggja bygningin í nýtslu.

Men tað er heldur onki sett av til tað.

Hans Petur Nielsen sigur, at tað tí er ógvuliga umráðandi, at peningurin verður játtaður, so at tað ber til at taka nýggja bygningin sum skjótast.

– Stendur hann tómur í meiri enn eitt hálvt ár, er tað ógvuliga óheppið.

Men trupulleikin er, at peningurin skal játtast á fíggjarlógini, men tað ber ikki til at keypa útgerð fyrrenn fíggjarlógin er samtykt seinast í desember.

Verður onki sett av í næsta ár, men er ætlanin at seta pening av til útgerð í 2004, kunnu vit sostatt ikki bíleggja útgerðina fyrrenn eftir 1.januar 2004. Síðani er ein ávís leveringstíð og tað tekur eisini tíð at seta útgerðina upp, so tað gongur tað mesta av 2005, árenn bygningurin verður klárur og tað mælir hann staðiliga frá.

Hansara uppskot er tí, at verður onki játtað komandi ár, so má Løgtingið gera eina verklagslóg sum bindur tað at játta peningin í 2004. So kann útgerðin verða bíløgd beinanvegin, so at hon verður klár at seta upp longu 1. januar 2005.

Men alt hetta eru politisku spurningar, sum Løgtingið má taka støðu til.



*Hans Petur Nielsen, yvirlækni, mælir staðiliga frá at drála ov leingi við at játta pening, so at nýggi bygningurin hjá Landssjúkrahúsinum kann takast í nýtslu, tí tíðin gongur ómetaliga skjótt undan og tað er skjótt, at tað ikki er tíðarhóskandi longur*





*Vit skulu helst ikki óttast, at hendan sjónin verður at síggja í føroyskum sjógvi*
*(Mynd: Reuter)*

# Neyvan eitt føroyskt »Prestige«

**Stór oljutangaskip sigla av og á í føroyskum sjógvi, men vandin er lítil fyri, at ein umhvørvisvanlukka hendir, heldur Elmar Højgaard, stjóri í fiskiveiðieftirlitinum**

DÁLKING
*Ingi Rasmussen*

Ongin skráseting er av tangaskipum, sum sigla í føroyskum sjógvi.

Sostatt ber ikki til at siga, um stór tangaskip sum »Prestige«, ið fór til botns við 70.000 tonsum av olju, sigla í føroyskum sjógvi.

Tað er kortini greitt, at stór tangaskip við fleiri túsund litrum av olju javnan sigla í havinum kring Føroyar. Serliga sunnanfyri oyggjarnar er nakað av tungari ferðslu.

Ein umhvørvisbumba álík henni, sum brast, tá »Prestige« kollsigldi, hendir tó neyvan um okkara leiðir, metir Elmar Højgaard, stjóri á fiskiveiðieftirlitinum.

– Stóru tangaskipini koma eisini gjøgnum føroyskt øki av og á, men tá eru tey langt úr landi, og ongin vandi er fyri, at tey renna á land, staðfestir Elmar Højgaard.

Standurin umborð á »Prestige«, sum fór av um tvøran 135 fjórðingar úr landi, var syndarligur. Ein danskur loðsur, sum førdi skipið gjøgnum Oyrasund, 11 dagar áðrenn vanlukkan hendi, var skelkaður yvir útgerðina umborð, og hvussu ringum standi skipið var í. Radarútgerðin og antikollisjónsskipanin var í ólagi, og tað átti ongantíð at fingið loyvi at siglt, sigur hann við Jyllands Posten.

Tað kemur fyri, at eitt nú russisk tangaskip koma inn á Redina at bunkra, men tey eru sjálvandi ikki so stór.

– Vit hava verið umborð og kanna skipini, tá tey eru komin higar, og tey skipini eru í hampiligum standi. Tað eru nokk so seriøsar fyritøkur, sum eru her, og tær fylgja øllum altjóða normum, sigur Elmar Højgaard.

Hann heldur samanumtikið, at vandin er rættiliga lítil fyri, at ein umhvørvisbumba kann bresta í føroyskum sjógvi, men hann ásannar í somu vending, at skaðaleys sigling illa ber til. 9

# Kravboð út í bláan heim

**Bonusskipanin er strangt persónlig, og tað ber als ikki til at tilluta einum almennum stovni stig fyri flogferðir. Tað sigur eitt umboð fyri Eurobonus. Sostatt eru kravboðini frá fíggjarmálaráðnum til almennar stovnar um, at bonusstig skulu falla til stovnin, als ikki í samsvari við skipanina**

EUROBONUS
*Ingi Rasmussen*

Eini boð tikin úr leysum lofti.

Soleiðis kann spariætlanin við almennum uttanlandsferðum best lýsast.

Fíggjarmálaráðið hevur givið almennum stovnsleiðarum boð um at flyta bonusstigini, sum teirra starvsfólk savna sær á ferðum uttanlands, til stovnin at brúka. Í brævinum verður álagt stovnsleiðarum at bera so í bandi, at tey bonusstig, sum starvsfólkini fáa, tá tey ferðast fyri tað almenna uttanlands, skal fella stovninum í lut – og ikki tí einstaka. Álagt verður sostatt stovnsleiðarunum at tryggja, at vunnin tænastustig vera nýtt til tænastuendamál.

Endamálið er at minka um útreiðslurnar hjá tí almenna til tænastuferðir uttanlands, og boðskapurin í brævinum er lættur at skilja: Tað eru almennu stovnarnir, sum hava rætt til bonusstigini, sum verða vunnin á tænastuferðum uttanlands, tí teir hava goldið fyri ferðirnar.



*Eurobonus-skipanin er strangt persónlig*

## Víðfevnt samstarv

Føroysku flogfeløgini nýta sonevndu Eurobonus-skipanina, sum SAS skipar fyri. Talan er um eitt víðfevnt samstarv, sum fevnir um stóran part av Evropa. Bæði Atlantic Airways og Maersk Air hava keypt sær limaskap í samstarvinum.

Fyri at vinna tær ein ókeypis túr til Keypmannahavnar, skalt tú hava savnað 20.000 stig. Fyri hvønn vanligan túr aftur og fram, fært tú 2.400 stig, og tað vil siga, at tá tú hevur ferðast 8 ferðir báðar vegir, kanst tú ferðast eina ferð ókeypis.

Stórur áhugi er fyri skipanini millum fólk, verður sagt av Flogfelag Føroya.

## Ber ikki til

Stendur tað til fíggjarmálaráðið, skal tað ikki bera til longur at savna sær sjálvum stig, tá tú ferðast í arbreiðsørindum fyri tað almenna. Men tað ber als ikki til at forða, sigur Anja Petersen, sum starvast í kundatænastuni hjá Eurobonus.

– Skipanin er ógvuliga persónlig. Tað er tann einstaki persónurin, sum er limur. Tað er hann, sum skrivar undir og hann, sum kann savna sær stig. Ongin stovnur ella fyritøka kann vera limur, og tey kunnu heldur ikki fáa tillutað nøkur stig, sigur Anja Petersen.

Hon ger púra greitt, at stigini heldur ikki kunnu latast frá einum persóni til ein annan. Og fer ein persónur úr starvi, so fylgja stigini, sum hann hevur vunnið av ferðum í starvsørindum, við honum.

Sostatt er líkt til, at fíggjarmálaráðið als ikki hevur kannað skipanina við Eurobonus nærri, áðrenn boðini til stovnsleiðarar eru send út.